## Triði hvør doyr av hjartasjúku

Ein nýggj uppgerð, sum heilsustovnurinm hjá ST, WHO, hevur gjørt um ymisk heilsuviðurskifti í 112 londum, vísir, at hjartasjúkur eru tann mest vanliga deyðaorsøkin í heiminum í dag. Samanumtikið doyggja 29 prosent av ymsum hjartasjúkum ella ymsum, sum hevur samband við hjartasjúkur. Uppgerðin vísir eisini, at 16 prosent doyggja av smittusjúkum, og at krabbamein er orsøkin til 12,6 prosent av øllum andlátum í heiminum.WHO vísir á, at við øðrum orðum doyggja næstan 60 prosent av hjartasjúkum, smittusjúkum og krabbameini.

## Samskip repar seglini

Íslendska farmaflutningsfelagið Samskip skerjir nú siglingina millu meginlandið og Ísland, soleiðis at siglingin verður ein fjórðing minni enn nú. Ólafur Ólafsson, sum er nevndarformaður í Samskipum, sigur sambært Lloyd´s, at figgjarkreppan í Íslandi rakar ikki felagið beinleiðis, tí leiðslan hevði fyrireikað seg til, at ein kreppa fór at koma. Nevndarformaðurin sjálvur er harafturímóti ikki sloppin snikkaleysur ígjøgnum kreppuna. Felag hansara, Egla Invest BV, átti 9,88 prosent av Kaupþingi, áðrenn stjórnin yvirtók bankan.



# Telefonsvik breiðir seg

**Nøkur 0088 nummur hava seinastu vikurnar ringt á ymiskar telefonir í Evropa. Talan er um svíkar, ið royna at lokka fólk at ringja aftur til sín, so teir kunnu vinna pening burturúr tí. Hesin trupulleiki er nú eisini komin til Føroyar**

TELEFONSVIK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár fekk ein maður í Havn eina uppringing frá einum telefonnummarið, sum byrjaði við 0088. Tað var ringt á fartelefonina hjá manninum, men maðurin var ov seinur at taka telefonina. Tá maðurin sjálvur kannaði málið á netinum, fann hann fram til, at tað helst var ætlanin, at hann skuldi ringja aftur.

- Fartelefonin hjá mær ringdi umleið klokkan tíggju í gjárkvøldið. Eg var ov seinur at taka telefonina, men gjørdist forvitin um nummarið, og kannaði tað á netinum, sigur maðurin, sum í gjár varð ringdur upp av einum 0088 nummarið. Helst er maðurin fegin um, at hann ikki ringdi aftur.

Orsøkin til, at maðurin kann fegnast, at hann ikki ringdi uppaftur, er, at so hevði hann fingið eitt stórt eykagjald á telefonrokningina fyri hendan mánaðin.

### Eitt víðfevnt fyribrigdi

Sosialurin hevur funnið fram til, at hetta fyribrigdi als ikki er serligt fyri danska ríkið. Tað hevur harafturímóti verið ein trupulleiki kring alt Evropa. Tí fólk úr Noregi, Sveits, Hollandi og so framvegis hava eisini fingið uppringingar frá hesum 0088 numrum, ið sambært donskum telefyritøkum helst stava av Balkan og eru keypt frá onkrari fylgisveinatænastu. Hátturin ið verður nýttur riggar júst sum nummarkall.

- Svikið riggar á sama hátt, sum tá mann nýtir tænastur sum nummarkall. Mann ringir upp, so kemur vanliga uppringingargjaldið, og síðani eitt eykagjald, sum kemur á minuttakstin, greiðir Jan Mortensen frá Føroya Tele frá. Hann leggur afturat, at hetta ikki er nakað ókent fyribrigdi, men at hesin hátturin at stjala pening frá fólkið, helst ikki er nýttur í Føroyum fyrr.

### Nýtið vit og skil

Jan Mortensen greiðir frá, at trupulleikin ikki er størri enn so, at um fólk nýta vit og skil, so kann sleppast undan hesi lokkafellu.

- At ringja til hesi numrini, er sum at geva einum tilvildarligum persóni sítt gjaldskort. Tað er sjálvandi ongin sum ger tað, men tað er so einfalt sum tað. Fólk skulu bara nýta vit og skil, og harvið ikki ringja aftur til nummur, sum tey onki hava við at gera, sigur Jan Mortensen.

### Torført at steðga

Í summum londum hava telefyritøkur roynt at stongja fyri líknandi numrum, men tað ætlar Føroya Tele ikki at gera.

- Tað er so torført at gera nakað tekniskt við trupulleikan. Mann kann sperra ávísum numrum, men tað er minst líka lætt at fáa sær eitt annað nummar, og so kann svikið halda fram. Tí vil eg bara staðiliga heita á fólk, um at lata vera við at ringja til nummur, mann ikki hevur nakað tilknýtið til, sigur Jan Mortensen.

### Mann má ringja sjálvur

Tað er tó ongin vandi við at tosa við fólk frá ókendum numrum, ið ringja til sín. Tí er tað, at hesir svikarar vilja hava fólk at ringja uppaftur til teirra.

- Er tað onkur sum ringir til sín, og vil selja okkurt ella líknandi, so er bara at tosa, tí tað ber ikki til at taka pening frá fólkið mann ringir til, fortelur Jan Mortensen, ið er stjóri á FT-Samskifti.



*Tá tú verður ringdur upp av einum ókendum nummarið, er best ikki at ringja aftur, tí tá kann gerast dýrt at vera forvitin*

*Modellmynd*

## Soleiðis gera teir

**Fyrst ringir eitt nummar á tína telefon. Helst verður lagt á, áðrenn tú fært tikið telefonina, og tá stendur so nummarið – sum í hesum føri byrjar við 0088 – á tínari telefon. Tá er vónin hjá svíkunum, at tú velur at ringja aftur. Tá tú fært samband, hoyrir tú ein telefonsvarara í hinum endanum. Tá er tað, at tín telefonrokning byrjar at vaksa heilt nógv. Í summum førum er prísurin hægri enn 50 krónur um minuttin, so best er at leggja á, um tú kemur í samband við slíkt.**

**Numrini, ið eru heilt víst eru svik, eru sambært donskum telefyritøkum, 0088 213213340 og 0088 213213342.**